Januar

LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

# TB/FCS/ROYN

**Við Stórá, Postrúm 35, FO-800 Tvøroyri**

**Sp/f-Skrás.nr.:**

## Ársfrásøgn

## 1. januar - 31. desember 2018

**FRUMRIT**

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á felagsins ársaðalfundi, tann .

______________________________

Fundarstjóri

# Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Upplýsingar um felagið** | |
| Upplýsingar um felagið | 5 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2018** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 6 |
| Rakstrarroknskapur | 7 |
| Fíggjarstøða | 8 |
| Notur | 10 |

## Leiðsluátekning

Nevndin hevur í dag lagt fram ársfrásøgnina fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2018 hjá TB/FCS/ROYN.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlóginaog tillaga eftir krøvunum í reglugerðini "Loyvisreglugerð 2018" hjá loyvisskipanini hjá FSF.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2018 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2018.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tvøroyri, tann 3. mai 2019

**Nevnd**

| Henrik Thomsen | Julius Vest Joensen | Eyðfinn Debes |
|---|---|---|
| formaður | varaformaður | nevndarlimur |

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til limirnar í TB/FCS/ROYN**

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá TB/FCS/ROYN fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2018 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini og tillaga eftir krøvunum í reglugerðini "Loyvisreglugerð 2019" hjá loyvisskipanini hjá FSF..

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2018 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2018 samsvarandi ársroknskaparlógini.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða etisku krøvunum fyri grannskoðarar (etisku reglunum hjá IESBA) og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, og vit hava hildið okkara etisku skyldur, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka selskabet, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

**Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin**

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.